# at standa og pissa



*Mads Christensen vil forkoma metrosexuella manninum sum situr og pissar, tí konan sigur tað. Nýggja fyrimyndin er retrosexuelli maðurin, sum ger sum hann vil og torur at siga nei við konuna. Menn skulu tora at standa og pissa, staðfestir hann*

## RETROSEKSUALITETUR

- Ein retrosexuellur rindar altíð, tá hann fer út at eta við eini damu.
- Ein retrosexuellur heldur altíð hurðini fyri konufólki.
- Ein retrosexuellur tekur sær av øllum og ordnar tað, óansæð um tað er eitt punkterað hjól, eitt innbrot ella ein náttúruvanlukka.
- Ein retrosexuellur ikki bara etur kjøt -hann skal helst sjálvur hava dripið tað!
- Ein retrosexuellur leggur ikki í, um hann eldist.
- Ein retrosexuellur eigur ikki fleiri vakurleikaprodukt enn konan. Umframt tingini at raka sær við er ikki nógv annað enn Nivea-krem at finna í toilet-taskuni hjá tí retrosexuella.
- Ein retrosexuellur nýtir ikki alla lønina uppá sálarliga hjálp til at finna seg sjálvan.
- Ein retrosexuellur dugir at binda ein ordiligan slipsknút.
- Ein retrosexuellur veit hvussu amboð skulu nýtast. Dugir hann ikki at negla ein seym ella at bora eitt beint hol, so má hann venja seg í loyndum.
- Ein retrosexuellur hevur minst eitt arr, sum hann kann reypa av.
- Ein retrosexuellur letur sessin til eina kvinnu, tá hann er í bussi/toki ella líknandi.
- Ein retrosexuellur kann til neyð keypa kvinnuting fyri konuna. Men ikki við góðum tannabiti.
- Ein retrosexuellur keypir ikki súrepla-Martini í eini barr. Hann drekkur øl og whiskey.
- Ein retrosexuellur fær sær ikki eina manicure eftir at hava fingið oljutar hendur av at skrúva uppá bilin ella motorsúkkluna.
- Ein retrosexuellur fýrur ikki fyri at taka uppvaskið av og á.